# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 23.03.2015*

**Bygdaráðsfundur 23.03.2015 kl. 16.00 til kl. 18.30**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 14/ 2015 Byggimál**

J. nr. 2015-0042-0346

**Málslýsing**

Í skrivi 12.02.2015 biðjur FT-net um graviloyvi Lýðarsvegur og Gaddavegur sambært tekningum. Grundin til grevsturin er umlegging av netinum.

**Tilmæli**

Á fundi 10.03.2015 mælir Tekniska nevnd til at geva FT-Net loyvi til at grava á Lýðarsvegi og Gaddavegnum eftir ávísum treytum.

Eisini verður mælt til at gongubreytin, við Lýðarsveg, verður dagførd og gjørd liðug av kommununi.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 15/2015 Vegamál**

J. nr. 2015-0044-0080

**Málslýsing**

Í skrivið dagfest 17.02.2015 søkir Herborg Petersen m.a. um loyvi til at gera parkeringsøki norðanfyri húsini á Regnavegi 42.

Ætlanin er at grava út, heilt norður til garðin hjá grannanum, Regnavegur 44 og eitt gott stykki niðan.

**Tilmæli**

Á fundi 10.3.2015 mælir Tekniska nevnd til at geva Herborg Petersen loyvi til at gera parkeringsøkið norðanfyri sethúsini.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 16/2015 Havnin**
J.nr. 2015-0046-0077
**Málslýsing**
Tekniski leiðarin hjá kommununi hevur gjørt eina kostnaðarmeting av arbeiðinum av at leggja nýggjar leiðingar og vegagerð omanfyri bátahylin í Oyrunum.

Samlaður kostnaður fyri leiðingar og asfaltering av koyrivegnum er kr. 809.000,00 u/mvg.

**Tilmælir**
Á fundi 10.03.2015 mælir Tekniska nevnd til, at arbeiðið verður gjørt. At leiðingarnar verða lagdar eftir galdandi spillivatnsætlan, og at koyrivegurin verður breiðkaður og asfalteraður, fyri ein samlaðan kostnað áljóðandi kr. 809.000,00.

Á fundi 17.03.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd. At peningurin fyri leiðingar, kr. 220.000,00 u/mvg, verður tikin av stovninum Teknisk mál íløgur, og peningurin fyri planering og asfaltering, kr. 589.000,00 u/mvg, verður tikin av stovninum Kommunal virkir íløgur.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 17/2015 Vegamál**
J.nr. 2015-0044-0081
**Málslýsing**
Tey elstu gøtuljósini í kommununi hava u58w armaturir, men nú fáast ikki eykalutir til hesi longur.

Tað sum nú verður brúkt er led armatur. Hesi brúka minni orku og hava longri livitíð.

Mett verður, at Nes kommuna eigur at byrja at útskifta til led armaturir, og at byrjast kann t.d. við tí innara partinum av Heygsvegnum har 6 lyktir eru. Kostnaðurin av hesum er kr. 30.000,00 fyri armaturir og arbeiðsløn.

**Tilmælir**
Á fundi 10.03.2015 mælir Tekniska nevnd til at skifta til led armaturir, og at byrja verður við at skifta 6 stk. í tí innara partinum av Heygsvegnum.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 23.03.2015*

Á fundi 17.03.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum Teknisk mál íløgur.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.